# Hita upp til Manchester City

Ársins fjeppari hjá EB/Streymi var í morgun skjótur at boða frá, at upphiting verður til UEFA-Cup dystin móti Manchester City. – Tá vit hita upp til allar aðrar stórdystir, skulu vit sjálvandi eisini hita upp til tann størsta dystin, sigur Rógvi Dam við heimasíðuna hjá EB/Streymi. Longu kl. 16.00 verður byrjað í Bowlinghøllini í Havn, soleiðis at lagið er av tí besta, tá dysturin verður bríkslaður í gongd kl. 19.00 á Tórsvølli. Úr EB/Streymi verður sagt, at lagið plagar at vera av tí besta til hesar upphitingar, og tí verður hildið fast í sama tátti, sum undanfarnu ferðirnar. Tað merkir at andlitsmáling, sangur og gott humør fara at merkja Bowlinghøllina í Havn millum kl. 16.00 og 19.00 hósdagin 17. juli.



# Ronaldo móti Føroyum

Ronaldo, Deco og hinar stjørnurnar hjá Portugal spæla venjingardyst móti føroyska A-landsliðnum tann 20. august. Hesum hevur Fótbóltssambandið boðað frá í morgun. Portugisiska fótbóltssambandið hevur boðið Føroyum til dystin sum liður í sínum fyrireikingum til komandi HM-undankapping, og hesum hevur FSF tikið av. Føroyar skulu í september mánaði spæla á útivølli móti Serbia og á heimavølli móti Rumenia.

# Sigfríður er altíð heppin



*– Hetta er tilvild, tí sjálvandi eri eg ikki føddur undir eini betri stjørnu enn onnur, sigur Sigfríður Clementsen, sum tvær ferðir hevur spælt eitt føroyskt lið víðari í altjóða fótbólti*

**Sum venjari Sigfríður Clementsen hevur verið serstakliga heppin í øllum sínum evropeisku lutakøstum. Nú stendur hann yvirfyri størstu avbjóðingini nakað føroyskt felag hevur havt**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í 2005 dróg Sigfríður íslendsku ÍBV, tá hann var venjari hjá B36 og skuldi spæla UEFA-Cup. Her spældu teir seg víðari, og fingu donsku FC Midtjylland. Í 2006 var B36 við í Champions Leauge lutakastinum, og dró Birkirkara frá Malta. Eisini her fekk Sigfríður B36 víðari, og mótstøðuliðið var mætu turkarnir úr Fenerbache.

Triðju ferð Sigfríður var partur av lutakastinum í evropeiskum fótbólti, var í ár. Hann er venjari hjá EB/Streymi, og hesaferð dróg hann Manchester City – størsta avbjóðingin nakað føroyskt fótbóltsfelag hevur staðið yvir fyri.

– Hetta er tilvild, tí sjálvandi eri eg ikki føddur undir eini betri stjørnu enn onnur, flennir Sigfríður Clementsen, sum ásannar, at hann hevur verið heppin.

Tá vit høvdu venjaran hjá EB/Streymi á orði í morgun, spurdu vit hann, hvat tað fyrsta hann var hann hugsaði, tá Manchester City varð drigið úr pottinum? – Hatta var stuttligt, hugsaði eg sum tað fyrsta. Tað næsta eg hugsaði var, vit koma neyvan víðari, flennir Sigfríður. Hann metir, at Manchester City er størsta avbjóðingin hjá einum føroyskum felag, og samanber tað við lutakastið, tá Føroyar møttu Fraklandi og Italiu.

## Mugu ongantíð gevast

Sigfríður vísir seg at vera garanturin fyri góðum úrslitum í Evropa. Men hvør verður hansara uppgáva nú City vitjar?

– Tað verður at syrgja fyri einum so góðum úrsliti sum gjørligt. Vit mugu fáa menninar at spæla, at tora at spæla frá byrjan til enda. Koma vit afturúr 1-0 ella 2-0, so mugu vit forseta við at spæla. Gera vit ikki tað, so skrædnar og vit tapa 10-0, sigur Sigfríður Clementsen.

Hann er sannførdur um, at City fer at stríðast frá byrjan til enda. – Teir hava nýggjan venjara. Hetta er teirra fyrsti dystur í ár, og sjálvsagt vilja teir vísa, at teir skulu byrja inni, tá Premier League byrjar, sigur Sigfríður.

## Ber til at vinna

Hóast Sigfríður er fullgreiður um, at tað verður meiri enn ein trupul uppgáva hjá EB/Streymi. Men tað er als ikki ómøguligt hjá EB/Streymi at fáa eitt gott úrslit.

– Dysturin byrjar 0-0. Spurningurin er bara, hvussu sannlíkt tað er, at vit halda javnleikin, ella fáa tað, sum betur er. Men tað ber til, er Sigfríður Clementsen sannførdur um.



*– Bangin eri eg ikki, men eg má viðganga, at eg eri øgiliga spentur, sigur Leif*

# Øðrvísi enn at spæla móti Jákup á Borg

**Eg hevði aldrin trú, at eg sum EB/Streymari fór at møta heimsstjørnum sum hesum, sigur Leif Niclasen hjá EB/Streymi**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Leif Niclasen hevur av álvara bitið seg fastan á besta liðnum hjá EB/Streymi í ár.

– Eg havi fingið kjansin av álvara undir Sigfríður, so tað hevur sanniliga gingið skjótt í ár, tá eg longu nú skal møta Manchester City, sigur Leif, sum er ovurfegin um lutakastið.

Undanfarin ár hevur Leif spælt mest á næstbesta liðnum hjá EB/Streymi, men nú skal hann upp í móti heimstjørnunum hjá Manchester City.

– Hetta verður heilt víst nakað annað enn at spæla móti HB og Jákup á Borg, flennir Leif.

Leif er gamal áleypari, men hevur spælt á vinstra bakki í ár, har hann hevur gjørt tað væl. Nú skal hann møguliga spæla yvirfyri Micah Richards.

– Hann er eitt tað største talentið í enskum fótbólti í longri tíð, so tað verður øgiliga spennandi, heldur Leif, sum í verjustøðu eisini skal ansa eftir Darius Vassel, Benjani, Bojinov og øðrum. Kortini er ungi norðskálamaðurin ikki bangin.

– Bangin eri eg ikki, men eg má viðganga, at eg eri øgiliga spentur, sigur Leif, sum fylgir væl við í enskum fótbólti. Spurdur, um hann nakrantíð frammanfyri sjónvarpinum ein leygardag hevur hugsað, at hetta vóru leikarar, hann skuldi spæla ímóti, svarar Leif soleiðis:

– Sum EB/Streymari havi eg trú, at tað var ógjørligt. Einasti møguleikin fyri tí var, um man bleiv seldur til eitt felag uttanlands. Men nú møta vit so teimum, hóast oddsini fyri tí vóru so lítil, sigur Leif Niclasen. 9